# TILTØK

**Gudstænastur**
**Alla halg. sunnudagur**
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen. Talvan gongur í Klaksvík fyri hjálpargrunnin
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Einkjugrunnin
*Havnar kirkja:* kl. 11, Hans J.Joensen, biskuppur
*kl. 16:* Minningargudstænasta hjá »Felagnum Pinkubarnadeyði«, Meinhard Bjartalíð
*Nólsoy:* kl. 12, Sonja Klein
*Kaldbak:* kl. 12, Jóannis Fonsdal. Talvan gongur í øllum kirkjum í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi fyri Føroyska Einkjugrunnin
*Tjørnuvík:* kl. 12, altarg., Mogens T. Christensen
*Hellurnar:* kl. 12, altarg., Uni Næs. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin
*Gøta:* kl. 12, Martin R. Jacobsen. Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin
*Vestmanna:* kl. 12, Inga Poulsen Dam. Í Vestmanna kirkju gongur talvan fyri Einkjugrunn Føroya
*kl. 15:* Familjugudstænasta. Innsavnað verður til gøtubørn í Kiev
*Gásadalur:* kl. 11 altarg., David Johannesen
*Broytt kirkjutíð:* komandi sunnudag 7. nov. verður farið í kirkju kl. 12 í Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø
*Norðskála:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa (minningarhald)
*Eiði:* kl. 15 Barnagudstænasta,
*Funningur:* kl. 17 messa (minningarhald), Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Einkjugrunnin
*Viðareiði:* Elsa Funding. Talvan gongur fyri Einkjugrunnin
*Vágur:* kl.11, altarg., í sambandi við Heimamissiónin er 100 ár, Bergur Joensen og Patrick de Neergaard
*Ellis og Røktarheimið á Tvøroyri:* kl. 16
*Suðuroyar Sjúkrahús:* kl. 17, altarg., Patrick de Neergaard
*Tvøroyri:* kl. 11, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyir Einkjugrunnin
*Sumba:* kl. 12 Sverri Steinhólm
*Sandur:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen. Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Einkjugrunninum
*Glyvrar:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð. Í Glyvra prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har pinkubørn verða signaðog prát við Heidi Andreassen. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jens Wang um evnið»Tunglyndi«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Drekkamunnur er millum møtini.
Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Týsdagin samlast húsbólkarnir.
www.livdin.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Møti, breyðbróting, barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið kl. 18 hava tey ungu møti.

**Sjómanskvinnuringurin á Argjum**
Vegna 100 ára hátíðarhald í Nesvík koma vit **ikki** saman mánakvøldið 8. nov.
Vit møtast í Havn mánakvøldið 15. nov. kl. 19.30.

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 6. november kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar. Tórhild Bjarkhamar og Inga Hansen luttaka við vitnisburði og sangi.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Jóanes Fonsdal presti. Evnið: Mika profetur.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Onnu Guttesen, evnið er: Umsorgan 1. partur, kl. 18 møti við húsbólki hjá Jens og Malenu Meitilberg.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdag kl. 20 Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taize) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum,Varðagøta 16.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa/ Finn Arvé prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti har filmurin »Ljós á gøtu míni« verður vístur. Filmurin lýsir arbeiði Frelsunarhersins millum heimleys og rúsnýtarar í Oslo. Arbeitt verður út frá »Fýrlyskorpset« har Erna og Njál starvast. Øll vælkomin.
Mánadagin kl. 17 Skótafundir.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti og kl. 12 tilbiðjanarmøti. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Drekkamunnur er millum møtini. Sunnudagsskúlin er kl. 12. www.livdin.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti, Jákup Jacobsen frá Lívdini í Hoyvík talar. www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Fríggjadagin kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, frá 5. flokki.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti – tey ungu skipa fyri.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Familjugudstænasta.
Mánakvøldið kl. 20 Meinigheitsfundur.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi.
Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Øssur Kjølbro.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti, Marner við Skipa og Jan Joensen og onnur luttaka. Øll eru vælkomin.

**Kollafjarðar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kaiffin Hammer.
Týsdagin kl. 20 Bíbiltími.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 15 Familjugudstænasta við Ingu Poulsen Dam, presti, o.ø., talvan gongur til frama fyri arbeiðið millum gøtubørn í Kiev.

**Norðskála kirkja**
Kirkju- og missiónsvikan byrjar í morgin – Alla halganna sunnudag – við skriftamáli kl. 11.40, messu kl. 12 og heldur fram alla vikuna við gudstænastum og møtum.
Mánakvøldið verður katekismusgudstænasta kl. 20. Evnið: Samfelag teirra heilagu.

**Hugnaløta**
Leygarkvøldið kl. 20.00 verður hugnaløta við sangi og vitnisburði í felagshølinum hjá Hæddini, Saltangará. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Jastrid Høj.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Tummas Jacobsen, Lee Hjaltalin syngur. (Náttúrði, øll taka við). Barnamøtikl. 17.
Mánakvøldið 8. nov. kl. 21. Felags Bønarmøti við lovsangi. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

## BRÚDLEYP

Leygardagin 30. okt. *giftust* í prestagarðinum í Kvívík Joan Skorðheim og Ingi Næs Rasmussen.

Leygardagin 1. januar 2005 kl. 15.00 giftast í Evangeliihúsinum í Tórshavn, Annika Jørgensen, Sørvágur og Magni Reinert, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma til teirra stóra dag, verða biðin um at tekna seg á tlf. 212480, 216185 ella 220145 áðrenn 5. desember.

Leygardagin 25. september *giftust* í Trinidad, Jan Erik Niclasen, Søldarfjørður og Nelia Daize, St. Vincent. Brúdleypsveitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík 4. desember kl. 18.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at ringja á tlf. 441800 ella 581800 áðrenn 20. november.

Leygardagin 20. november kl. 13.00 giftast í Betesda í Klaksvík, Amalia Hansen, Klaksvík og Ólavur M. Lamhauge, Søldarfjørður. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at ringja á tlf. 456728 ella 441168, áðrenn 10. nov. 2004.

4. desember giftast í prestagarðinum á Brekku í Klaksvík, Mary Ziska og Heri Henriksen, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Norð kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at siga frá á tlf. 459016, 223016 ella 262387 í seinasta lagi 25. november.

2. juli í 2005 giftast í Noreg, Tone Blindheim, Bartavik, Noreg og Johnny Willumsen, Hvalba. Tit, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, vinarliga sigið okkum frá sum skjótast og helst áðrenn 15. november, so vit kunnu útvega bústað til brúdleypsgestirnar. Sigið frá á tlf. 375239 ella 251984.

## SILVURBRÚDLEYP

11. november hava hjúnini Klara og Torfinn Hansen, Leirvík, silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í heiminum 14. november kl. 19.00.

24. november hava hjúnini Kristina og Andras Nybo, Hósvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Hósvík leygarkvøldið 20. november kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 422435 ella 214416 til og við 7. november.

24. november hava Andrea og Thorleif Isaksen, Søldarfjørður, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin 27. nov. kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við silvurbrúðarparinum kunnu boða frá innan 17. november á tlf. 441687 ella 211687.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Mt. 25, 45: »So satt sum tit ikki hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu, tá hava tit heldur ikki gjørt tað móti mær«.*

Ein rekamaður, ella vagabondi, hjá Storm P. sigur við ein annan rekamann: »Harraguð, vit eru bara menniskju«. Og hin svarar: »Sum um tað ikki er ríkiligt.«

Storm P., sum alt sítt lív hevði ein serligan alsk til og ans fyri gatubørnunum, samfelagsins útskotum, var serliga hugtikin av tí einfalda lívsvísdómi, sum gjørdi seg galdandi millum hesar ognarloysingar. Ikki tí at hann romantiserar teirra lív, har er lítið so lítið at romantisera, harðbalin, sum teirra kor eru. Men hjá Storm P. umboða hesi menniskjuni eina lívsneyðuga dimensión, ein spontanitet og eina trúgv, sum ikki er bangin fyri at dálka sína hendur av ótta fyri, hvat hini siga; serliga tey, sum hava sítt uppá tað turra, bæði andaliga og materielt. Íblásturin aftanfyri kærleikan mótvegis hesum frælsisleitandi ognarloysingum er hjá Storm P. Jesus. Ikki tann sukursøta, smáborgarliga útgávan av Jesusi, sum vit eftirhondini eru so von við her á landi, har øll skulu stoypast í sama formi sum nakrir samkomuleiðarar, men tann Jesus, sum ikki himprast við at seta seg til borðs saman við teimum fordømdu.

Eg skal vera tann fyrsti til at viðganga, at trúgvin kann vera avmarkandi, kann seta í bás, hon kann vera spreingifarlig, tí hon kann sortera og døma. Hetta er tann trúgvin, sum vit í NT kenna undir hugtakinum fariseisma, har skriftin hevur størri týdning enn meðmenniskjað, og har meðmenniskjað tískil mangan verður útstoytt. Søren Kierkegaard ímyndar sær nakrar sjónleikarar, sum ferðast runt við einum sjónleiki, har tann eini spælur kongur, ein annar er ráðharri, og tann triðji er biddari – hann ímyndar sær at teir eitt kvøldið gerast svakir, og trúgva, at teir veruliga eru tað, sum teir spæla – so at tann, sum spældi kongur t.d. ikki longur vildi hava nakað við tann at gera, sum spældi biddari. Og at tann, sum spældi ráðharri bara vildi eta saman við drotningini. Í einum sjónleikaraframførslu hevð hetta verið komiskt – men í tí veruliga lívinum er tað júst soleiðis vit handla og seta innanhýsis mørk fyri hvørjum øðrum. Vit gera tað dagliga. Tá verður trúgvin til eitt lyklarhol, sum niðurbindur menniskjuna, bæði okkum sjálv, og okkara meðmenniskju.

Karen Blixen skrivar einastaðni, at »Guð unti sjálvt tí minsta skapninginum at vera til, og at vera til sum seg sjálvan.« Her er trúgvin ekspanderandi, hon spreingir mørk, hon er ikki moralistisk, men góðtekur menniskju uppá teirra egnu treytir. Og tað heilt avgerandi, hon torir at siga, at tú skalt trúgva tú ert nakað, at tú skalt tora at trúgva á teg sjálvan. Bæði tá tú hevur tað gott og fungerar væl, men ikki minst, tá tú følir, at alt miseydnast, og at tú ert um at ganga til grundar av berum skuffilsi yvir teg sjálvan, uppetin av kensluni av, at tú einki ert verdur, og at lívið ikki er vert at liva. Ella tí at hini siga, at tú einki virði hevur.

Ella, sum Jesus sjálvur sigur: *»Sanniliga, sanniliga sigi eg tykkum, so satt sum tit ikki hava gjørt hetta ímóti einum av mínum minstu, tá hava tit heldur ikki gjørt tað móti mær.«* (Mt. 25, 45).

**Ólavur Rasmussen, prestur**



# TILTØK

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við sangi og vitniløtu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor. Barnakórið venur kl. 15.15 og møti er kl. 18.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 17 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Bygdarhúsið í Tjørnuvík**
Møtini eru hvørt gerandiskvøld kl. 20. Sunnukvøldið kl. 19.
Leygarkvøldið: Sylverius Jacobsen talar, Jóhanna Hallgerð og Marita syngja.
Sunnudagur: kl. 12 Gudstænasta við altarg., Mogens T. Christensen, kl. 15 Familjumøti við Turið og Snorra Brend, kl. 19 Sigfred Johannessen talar, Magda og Maibritt syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Jógvan Højgaard talar, Streingjakórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Sang- og vitnimøti, kl. 21 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**KFUM og K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti v/ Torstein Jóhannessen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 10 Morgunmøti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Betesda, Norðoyggjar**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

**Ósaskúlin, Klaksvík**
Leygardagin 6/11 kl. 16.00 fer Jørn Nielsen úr Danmark at halda almennan fyrilestur í Ósaskúlanum um evnið: »Ísrael – í fortíð, nútíð og framtíð«. Kvartettin í Betesda syngur.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti við Gimma Olsen og ung úr KFUM. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiði 1.-6.fl., kl. 19 ungdómsarbeiði 7. fl. og eldri. Øll eru hjartaliga vælkomin.
**Í samband við at húsið verður 50 ár 14. nov. verður føðingardagshald hildið í Samljóð í døgunum 12.-14. nov.**

**Sandoy – Samljóð í Skopun**
Mánakvøldið 8/11 kl. 19.30 fara Jørn Nielsen úr Danmark, Svenning av Lofti og Poul Johan Djurhuus at hava almennan fund í bygdarhúsinum »Samljóð« í Skopun um evnið: »Ísrael – í fortíð, nútíð og framtíð«. Sangfólk luttaka.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Vegna 100 ára hald í Vági verður eingin sunnudagsskúli og einki møti sunnudagin.

**Aglow, Vágur**
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í Missiónshúsinum í Sørvági. Tummas Jacobsen talar.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Evangel. møti, Niels Hammer talar.
Mánadagin kl. 20 Bíbiltími v/ Eingrím Holm – 1. Jóhs. br.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Leygardagin kl. 15 Barnatiltak í kirkjuni v/ Petur F. Johannesen, kl. 20 í Missiónshúsinum, Pól Johannesenog Niels J. Nielsen talar, Porkeriskórið syngur, kl. 22 Ungdómsmøti v/ Hans Chr. Justesen.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ altarg., Kirkjukórið Ljómur syngur, kl. 18 Møti, Regin Høgnesen talar, Kór av Tvøroyri syngur.

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Suðuroy – Hotel Øravík**
Sunnudagin 7/11 kl. 14.30 luttaka Jørn Nielsen úr Danmark og Svenning av Lofti á almennum fundi í Hotel Øravík sunnudagin kl. 14.30. Evnið: »Ísrael – í fortíð, nútíð og framtíð«. Sangfólk úr Suðuroynni syngja.

**Evangeliskur fundur í Ålborg**
Leygarkvøldið 6. nov. kl. 19 Evangel. fundur í Daghammerskjolds gade 2, Ålborg. Talarar: Brøður úr Malta Hirtshals og onnur við. Eftir fundin bjóða vit kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 8. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Vit hugsa um jólini
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl. Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilm. tlf. 316491
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen.
**Komandi mánadagar kemur Birgar at vitja Tilhaldið, at kunna seg meira um Havnina**
*Týsdagin 9. november*
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. Benny og Flemming Samuelsen.Vitjan av gestum frá Fø. Fólkaháskúla.
kl. 15.00: **Aldursbroytingar við hoyrnini**, Petur Ellefsen, oyrnalækni
*Mikudagin 10. november*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15.00 **Vitja vatnverkið í Villingadali.**
Tilm. tlf. 316491
kl. 17.00–21.00: Opið hús
*Hósdagin 11. november*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt taluprát, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 12. november*
kl. 10.00–13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.00–17.00: Opið hús.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólíkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mánadagin 8. nov.*
Upplestur
*Mikudagin 10. nov.*
Boccia í Missiónshúsinum

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 8. november*
Fimleikur
*Týsdagin 9. november:*
Vit spæla Boccia
*Mikudagin 10. november:*
Vit gera bomm
*Hósdagin 11. november:*
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte.
*Fríggjadagin 12. november:*
OPIÐ HÚS.

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Ørkin í Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøldið kl. 20.30.
Leygarkvøldið 6. nov.: Hugnakvøld v/ Bjarna Bæk, dómprósti.
Sunnudagin 7. nov. kl. 15.00: Gudstænasta í Háteigskirkju v/ Bjarna Bæk, dómprósti. Aftaná verður kaffi á Ørkini.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Heilafelagið**
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 06.11. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 07.11. kl. $22^{00}$




Leygardagin 06.11. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 07.11. kl. $19^{30}$




Leygardagin 06.11. kl. $19^{45}$
Leygardagin 06.11. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 07.11. kl. $19^{45}$
Sunnudagin 07.11. kl. $22^{30}$

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning Fríggjadagin 12.11.**




**Frumsýning Fríggjadagin 12.11.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**